# Bæði vardu sítt

*Oddastríðið í Vági endaði, sum tað byrjaði. Hvørki HB ella VB megnaði at skapa teir stóru møguleikarnar, og yvirhøvur tóktist aðalmálið hjá báðum at liggja í verjupartinum*

Jákup Mørk

VB-HB 0-0

Karmarnir til ein rættan toppdyst vóru so avgjørt til staðar, tá leikararnir hjá ávíkavist VB og HB gjørdu seg til reiðar at fara á vøllin sunnudagin.

Heimaliðið, sum ikki hevur ligið so væl fyri í nógv, nógv ár, hevði sjálvsagt dyggan stuðul frá áskoðarunum, og longu áðrenn dysturin byrjaði, vórðu nøkur dundur frá fýrverki at hoyra á Eiðinum.

HB leikararnir høvdu tó eisini nakrar av sínum stuðlum við. Stuðlafelagið hevði skipað fyri útferð, og alt í alt mundu eini hálvhundrað havnarfólk standa við eystursíðuna av vøllinum, haðani tey royndu at eggja sínar leikarar.

Og tað hoyrir eisini til, at veðrið var av tí allarfagrasta, og longu langt undan dystinum streymaðu fólk út á Eiðið.



*Hvørki av liðunum vildi offra nóg nógv í verjupartinum, og millum annað varð Krzystof Popzynski einsamallur á toppinum hjá VB*

**Mynd: Áki Bertholdsen**

**Verjukent**

Frá byrjan var líkt til, at talan skuldi gerast um ein dyst við sera fáum opnum møguleikum. VB var skert, tí Robert Cieslewicz hevði leikbann, og tí var leikandi venjarin, Krzystof Popczynski, einsamallur á toppinum. Ætlanin var allarhelst, at vongverjarnir og annar av framrættaðu miðvallarunum skuldu stuðla í álopspartinum, men yvirhøvur var uppgávan hjá venjaranum sera trupul. Vandamestir vóru vágbingarnir, tá tað eydnaðist at spæla seg ígjøgnum í borðunum, men innleggini saknaðu neyvleika, og tí gjørdist talan sjáldan um vandamiklar støður.

Eisini HB var sera verjukent í útgangsstøðnum. Ikki tí, fólkið var tað sama, og taktiktalvan segði framvegis 4-4-2, men eitt nú varð sera sjáldan roynt at nýta síðurnar til at bróta seg ígjøgnum. Bakkarnir høvdu heilt sjónligt fingið boð um at halda seg til verjupartin, og hetta avmarkaði álopsmøguleikarnar hjá gestunum.

Ístaðin varð ofta roynt við longum sendingum niðan til áleypararnar, sum meira ella minni einsamallir royndu at koma framvið VB verjuni. Undantakið var, tá Allan Mørkøre, sum nú tykist á veg upp aftur, kom framvið í høgru.

**Hvør sína løtu**

Eftir at bæði liðini sostatt løgdu sera varisliga fyri, fekk HB eina lítla yvirvág seinna partin av fyrra hálvleiki.

Yvirvágin gav tó ikki teir stóru møguleikarnar, men hinvegin hildu teir í allarflestu førum vágbingum langt frá HB málinum. Gestirnir vóru hesa løtuna fyrst á flest øllum bóltum á miðvøllinum, men nærri enn einari góðari roynd við høvdinum frá Jón Róa Jacobsen, og einum frísparki frá Allani úr 25 metrum, komu teir ongantíð.

Sum nevnt, so hevði HB gott tak á miðvøllinum hesa løtuna, og allarhelst var tað hetta, sum VB venjarin hevði hugsað mest um í hálvleikinum. Í øllum førum tóktust vágbingarnir nógv meira tendraðir, tá teir fóru á vøllin til seinna hálvleik.

Bóltarnir, sum HB hevði vunnið í fyrra, komu nú aloftast til eitt VB bein, og spakuliga otaðu vágbingar seg longur oman móti HB málinum. Nærmast vóru teir við, tá Milan Kulic frágera væl snaraði HB verjuleikara av sær á skeyt frá brotsteigarsamankomingini. Bárður vardi tó sera væl fyri, tá hann fekk sligið dúkkandi skotið upp um málið.

Nakað seinni fekk VB eitt heldur bíligt fríspark beint uttan fyri brotsteigin, tá Símun klossaðist so við bóltinum, at hesin støkk upp í hondina. Milan royndi seg við einum fløtum skoti niður móti handara horni, men Bárður fekk tveitt seg, soleiðis at eisini tann vandin var av.

Júst hetta frísparkið var annars eitt gott dømi um, hvussu ótryggir leikararnir vóru á vøllinum. Hóast talan var um ógvuliga taktiskt vøllinum, og so vóna at teir har frammi megnaðu at gera eitthvørt.

Talan er tó um stórar íløgur, sum skulu gerast, um nøkur vón skal vera at betra um vøllin, og tí er helst líkt til, at trupulleikin av vøllinum í Vági stendur við nøkur ár frameftir.

**Ingi tetti aftur**

VB hevði sostatt eina hampuliga yvirvág á miðvøllinum hesa løtuna, men eftir at HB venjarin hevði sett Inga Rasmussen inn fyri Hall Danielsen broyttist hetta aftur.

Ikki soleiðis at HB nú fekk nakra yvirvág, men evnini hjá Inga sum bóltvinnara og bylgjubrótara á miðvøllinum komu sera greitt til sjóndar, og HB spæl frá báðum pørtum, er einki at ivast í, at undirhaldsvirði hevði verið størri, um vallarumstøðurnar vóru betri. Uppbyggjandi spæl frá verjuni og frameftir var sostatt nærum ikki talan um. Heldur varð satsað upp á langar bóltar niðan eftir fekk nú aftur flutt spælið eitt sindur niðan á vøllin.

Málmøguleikar varð tó ongan tíð talan um. Tað einu ferðina fekk Bjarni ikki fatur á einum innleggi, men VB verjan fekk ruddað burtur, og í hinum endanum royndi Krzystof seg við einum skotið úr stórari fjarstøðu, sum gav Bárða nakað av trupulleikum, tá bólturin støkk í váta vøllin.

Málleysi javnleikurin nærkaðist tí alsamt, og gjørdist at enda veruleiki.

Sum heild kann sigast um dystin, at hóast taktiska uppleggið hjá báðum pørtum var at binda fyri í verjupartinum, so var talan alla tíðina um ein spennandi dyst. Nervin fór ongantíð úr, og nógvir intensir nærdystir vóru eisini at síggja. Javnleikur var tó einasta rætta úrslitið, og hetta tóktust báðir partar eisini at vera hampuliga væl nøgdir um, tá dómarin hevði bríkslað fyri seinastu ferð.

At enda skal nevnast, at tað tænir báðum pørtum til rós (og eisini dómaranum) at hóast talan var um ein sera javnan dyst, so gjørdist ongantíð neyðugt við nakrari kortveittran, so sum tað ofta sæst, tá nærdystirnir eru nógvir og tættir. Tað sama kann ikki sigast um Eyðun Kjærbo, sum av beinkinum fekk gult kort fyri at brúka seg móti bæði dómara og linjuverja.

**VB-HB 0-0**

Dómari: Lassin Isaksen

**VB:**
Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussn, Eyðun Kjærbo, Milan Kulic, Tórður Holm, Michael í Lágabø, Jón Pauli Olsen – Krzystof Popzynski

**HB:**
Bárður Johannesen – Jóhannis Joensen, Hans á Lag, Símun Eliasen, Janus Joensen – Allan Mørkøre, Rúni Nolsøe, Hallur Danielsen, Rói Árting – Jón Rói Jacobsen, Andrew á Fløtum

# Nøgdur við stigið

*Liðskiparin hjá HB var nøgdur um úrslitið, sum teir fingu suðuri í Vági*

Jákup Mørk

Rúni Nolsøe var í nøkur ár spælskipari á miðvøllinum hjá VB, men síðani 1993 hevur hann havt hendan leiklutin hjá HB, har hann nú eisini er liðformaður.

Eftir dystin móti VB helt hann, at sum so var hann ikki nøgdur við spælið, sum HB sýndi, men at úrslitið var í lagi fyri teirra viðkomandi:

- Nei, vit fóru ikki inn á vøllin eftir einum javnleiki.



*Hóast spælið ikki var av tí besta, var Rúni Nolsøe kortini nøgdur um úrslitið móti vágbingum*

Vit kunnu í øllum førum liva betri við einum javnleiki enn VB kann, helt hann fyri, tá vit spurdu hann, um teir fóru á vøllin eftir einum javnleiki.

**Einki er avgjørt**

Tá tosið fall inn á, hvat lið kann kalla seg føroyameistara, ta kappingin er liðug um ein góðan mánað, var HB liðformaðurin tó eitt sindur í iva:

- Sjálvandi vilja vit royna at vinna, men tað er ógvuliga torført at spáa um, hvat lið tað verður. Tað tó tað liðið, sum sýnir størsta stabilitetin í avrikum sínum, tað sum eftir er av kappingini. Øll oddaliðini hava torførar dystir eftir, so har kann alt henda, segði altso Rúni Nolsøe.



# B68 setti met móti KÍ

*KÍ korthúsið hoyknaði undir kontraspælinum hjá toftamonnum, og tað kendist eyðmýkjandi hjá gestunum, tá tveir teirra vórðu riknir av vøllinum*



*Rógvi Jacobsen tykist langt við síðuna av sær sjálvum í løtuni, og sunnudagin hálvavegna bað hann um at fáa ostaskorpuna frá dómaranum*

**Mynd: Jonhard Hammer**

KÍ plagar at hava takið á B68 á Svangaskarði. Hetta varð sagt í blaðnum leygardagin, og hagtølini staðfestu henda veruleikan. Undan sunnudegnum vísti samlaðu tølini á Svangaskarði frá 1988 og til 1999 13 til B68 og 23 til KÍ. Stórsigurin hesa ferð hjá toftamonnum var tann rudduligasti nakrantíð ímóti klaksvíkingum, og hann boðaði frá, at útiliðið hevur mist allan íblástur, meðan B68 av álvara tykist trúgva upp á møguleikan fyri at enda ovast.

Men áðrenn tað verður farið víðari við útpenslingini av, hvussu sannførandi B68 sigurin gjørdist, so eigur at verða undirstrikað, at fyrra umfarið bendi lítið ella rættari sagt einki á, at talan skuldi gerast um stórsigur.

Klaksvíkingar trýstu fyrstu fáu minuttirnar, og so spældu teir væl eina løtu. At tað var B68, sum setti hol á málskjótingina, var eitt sindur misvísandi, tí tá fyrra umfarið var hálvrunnið lá tað í luftini, at KÍ skuldi fáa fyrsta málið. Teir samanspældu væl fram móti brotsteiginum, og Heðin á Lakjuni og Ove Nysted vóru nær við, men teir komu ikki nærri, og so small B68 hamarin:

Álopssinnaði Marlon Jorge hevði ongar trupulleikar á høgra vongverja. Jákup Djurhuus, sum hesa ferð spældi við stórum sjálvsáliti í vinstru, vann bóltin, stakk fram á vinstra vong til Øssur Hansen, sum krúllaði langt fram á KÍ hálvuna, áðrenn hann sendi mitt innfyri málið, har Marcello Marcellino hekk mitt fyri málinum og stútaði í kassan.

Tá var fyrra umfarið hálvrunnið, og klaksvíkingar vóru skelkaðir. Men tað gekk bara ein lítil løta, so høvdu teir javna, og restina av 1. hálvleiki var spælbýtið javnt, og einki bendi á avhølving.

Marek javnaði við fløtum frísparki úr 18 metrum, og løtuna aftaná vóru boð eftir toftamonnum. Eftir lítlari løtu hevði Ove Nysted vandamiklan stútara, sum Magnus Poulsen avbera væl bjargaði til horna, og so sendi Rógvi Jacobsen úr átjan metrum úr høgru og í handara stólpan.

**Skipbrotið**

Fyrsta korterið av 2. hálvleiki datt KÍ saman. Tá tíggju minuttir vóru farnir, hevði B68 skorað tvær ferðir, og so gjørdist tað uppaftur meiri eyðsýnt, at løtan nærkaðist, tá Tummas Pauli Olsen fór at leita eftir ostaskorpuni.

Longu í 1. hálvleiki høvdu fleiri klaksvíkingar fingið gul kort fyri ófantalig fríspørk langt frammi á vøllinum, og eftir at B68 hevði lagt seg á odda og økt um leiðsluna spældu klaksvíkingar sjálvir sær av við allar møguleikar.

Inni í B68 brotsteiginum gjørdi Ove Nysted av við seg sjálvan í samanbresti við B68 miðverjan Oleif Joensen, og Rógvi Jacobsen, sum á miðvøllinum var heilt við síðuna av tí, sum í fjør gjørdi hann til lyklaspælara á FM og steypavinnaraliðnum, so at siga kroysti dómaran eftir næsta gula kortinum og harvið tí reyða.

So var KÍ liðið upployst. Teir vóru níggju ímóti ellivu. Veteranarnir skulu hava rós fyri, at teir royndu sum frægast fyri at avmarka tapið. Høvdu teir ikki gjørt tað, so kundi úrslitið sæð uppaftur ljótari út.

**Liðavrik og úrmælingar**

Jóannes Jakobsen tóktist síggja møguleikan fyri totalari eyðmýking av sínum gamla liði. Síðstu løtuna hevði KÍ bara ein álopsspælara. So varð Jan C. Dam, sum hevði verið tryggur aftasti skansi aftanfyri sannførandi Arnbjørn Danielsen og stóra stríðsmannin Oleif Joensen, tikin út, og Øssur Jacobsen kom inn. Tá var støðan 5–1, og tað eydnaðist eftir uppspæl frá hesum Øssuri at økja til tennisúrslitið.

B68 brúkti í 2. hálvleiki sínar talentir til fulnar. Teir dúvaðu upp á kontraálop, og avgerandi málini vórðu skorað eftir genialar langar og neyvar sendingar. Øssur Hansen hevur neyvan verið betri fyri, enn hann er nú. Tíðliga í 2. hálvleiki var hann arkitekturin aftanfyri tvey framúr uppspæl til mál:

Eftir at hava fingið bóltin frá Eyðsteini Skipanes við síðulinjuna í vinstru, dróg hann tjúgu metrar inni á KÍ hálvuni upp á tvørs. Í besta Laudrup stíli, ella sum tá ein strikuspælari í hondbólti verður spældur leysur, sletti hann bóltin fram ímillum til Fróða Benjaminsen, sum á markinum til rangstøðu gjørdist púra leysur ímillum tøvandi Andrzej Pacek og Jan Andreasen. Í tí støðuni var landsliðsmaðurin tryggur, og lítla løtu seinni varð aftur staðfest, at KÍ verjan var skelkað.

Øssur Hansen stríddi seg ígjøgnum heilt í vinstru, 30 metra neyvu sendingina tvørtur um tamdi Marcello, og sjálvt um Súni Fríði Johannesen var eitt sindur trongdur, so eydnaðist honum at skora.

3–1 gjørdist til 4–1. Aftur var talan um uppspæl í vinstru. Jákup Djurhuus vann bóltin, legði innfyri, aftur hesa ferð tamdi Marcello og prikaði til Súna Fríða Johannesen, sum skoraði.

Marcello stóð fyri síðstu avklæðingini. Fyrst lyfti hann úr 25 metrum og frá síðulinjuni langt upp og niður í handara tríkantin, og fýra minuttir undan leikloki setti hann síðsta seymin í. Toftamenn spældu seg til fleiri aðrar møguleikar ímóti undirmannaðu mótstøðumonnunum, men Zoltan vardi fleiri ferðir væl fyri.

Tað kundu toftamenn væl liva við. Í góðveðrinum – lítla lotið út eftir vøllinum bilaði einki – høvdu teir sett KÍ so dyggiliga upp á pláss, sum teir ongantíð áður hava gjørt. Eftir síðsta bríkslið sást væl, at nú hevur B68 sjálvsálit at bjóða øllum av í kappingini um FM. Og viðhaldsfólkini tykjast trúgva upp á, at Súni Fríði, Marcello, Øssur, Arnbjørn, Jan C. Dam og allir hinir kunnu megna tað, teir vilja.

**jh**

# Alt er opið

Leikandi venjarin hjá VB, Krzystof Popczynski, helt eftir dystin móti HB, at hvørki av liðunum kundu iðra seg serliga nógv um javnleikin sunnudagin:

- Hatta var ein dystur, sum átti at enda 0-0. HB hevði kanska eitt lítið yvirtak í fyrra hálvleiki, meðan vit høvdu eitt lítið yvirtak í seinna hálvleiki. Talan gjørdist eisini um tveir hampuligar møguleikar í part, men tað var so at siga alt, helt pólverjin um sjálvan dystin.

Tað var annars líkt til, at leikandi venjarin saknaði vanliga álopsfelaga sín, Robert Cieslewicz undir liðini á sær uppi í álopinum, men hetta vildi hann ikki á nakran hátt nýta sum umbering:

- Tá vit spæla við einum áleypara krevur tað, at vit eisini hava ógvuliga framrættaðar vongverjar. Hetta royndu vit, men tá HB alla tíðina helt sínum bakkum afturi, var sera trupult hjá okkum at koma ígjøgnum, eins og tað hjá mær var ringt at skapa nakað sjálvur, var einasta viðmerkingin vit fingu um hetta.

**Alt er opið**

Og gullvónin hjá VB livir framvegis væl, sum vit skiltu á venjaranum. Í so máta helt hann ikki, at talan var um nakran katastrofalan stigamiss móti HB:

- Tað er framvegis fullkomuliga opið, hvør fer avstað við gullmerkjunum. Í mínum eygum hava B68, VB og HB øll eins góðar møguleikar, og heldur ikki kunnu B36 og NSÍ avskrivast. Vit ætla so at gera tað, sum vit kunnu, til tess at vinna eina so góða endastøðu sum gjørligt.

Um hetta seinasta skal leggjast afturat, at tá vit tosaðu við Krzystof beint eftir dystin, vóru hinir dystirnir ikki liðugt leiktir, og at vit tí ikki kendu úrslitini av hesum dystum. Úrslit sum eftir øllum at døma hava tveitt bæði B36 og NSÍ út úr gullkálvadansinum.



*Hóast stigamissin móti HB, metti VB venjarin, at alt framvegis er púrasta opið í dystinum um gullmerkini*

**Mynd: Áki Bertholdsen**

**B68-KÍ 6-1 (1-1)**
1-0: Marcello 9
1-1: Marek Wierzbicki 25
2-1: Fróði Benjaminsen 50
3-1: Súni Fríði Johannesen 57
4-1: Súni Fríði Johannesen 61
5-1: Marcello 67
6-1: Marcello 86
Dómari: Tummas Pauli Olsen (GÍ)

**B68:**
Magnus Poulsen – Marlon Jorge, Oleif Joensen, Jan C. Dam, Jákup Djurhuus – Fróði Benjaminsen, Eyðstein Skipanes, Øssur Hansen – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino

**KÍ:**
Zoltan Kujundzic – Harley Bertholdsen, Andrzej Pacek, Jan Andreasen, Niclas Niclassen – Símun Waag Høgnesen, Marek Wierzbicki, Rógvi Jacobsen – Arnold Joensen, Ove Nysted, Heðin á Lakjuni